# 85 metrar av brúgvum

**VESTMANNA** Fyrireikararnir av Bátastevnuni dugdu í 2002 neyvan at ímynda sær, hvussu stór undirtøkan fór at verða. Tey fyrstu árini var undirtøkan góð, men síðani er hon vorðin størri, fyri ikki at siga rættiliga stór. Okkurt árið vóru 3500 fólk í bygdini undir stevnuni.

Snorri Brend



*Bátarnir hava ligið tætt í Vestmanna. Men í ár verða umstøðurnar bæði øðrvísi og betri*

Góða undirtøkan setti eisini krøv til annað enn skránna. Tann stóri spurningurin var, hvussu bátarnir skuldu kunnu liggja, bæði trygt og gott.

– Men henda spurningin hava vit nú loyst, slær ein av fyrireikarunum, Rógvi Nielsen fast.

Tey, ið hava verið til tær undanfarnur bátastevnurnar, bátafestivalarnir ella líknandi tiltøk vita, at bátarnir eru ymiskir, bæði av slagi, stødd og ikki minst prísklassa.

Ein partur av bátunum eru í tí dýrara endanum, har til ber hjá monnum og familjum teirra at verða búgvandi umborð undir stevnuni.

– Hetta hevur eisini tað við sær, at menn eru sera eymir um sínar bátar. Og tí eru teir heldur ikki serliga fegnir um, at fólk ganga bát av báti fyri at koma til sín egna bát, slær Rógvi Nielsen fast.

Veruleikin er jú hann, at liggur ein uttast í røðini, er rættiliga langur vegur og rættiliga stríggið at ganga av bryggjukantinum og umborð á sín egna bát – onkutíð heilt yvirum 16 aðrar bátar.

Fleiri hava eisini børnini við, og liggja tey tá og sova, er altíð ein møguleiki fyri at tey vakna, tá fólk soleiðis ganga bát av báti á miðjari nátt.

## Bíleggja pláss

At byrja við lógu bátarnir við bryggjuna, og sum oftast uttan á hvørjum øðrum. Prinsippið var »først til mølle«. Hetta var á mangar mátar ein neyðug loysn tá.

Tann stóri trupulleikin var, at fleiri bátar hildu sera fast um sítt pláss. Teir kundu tí ikki fara við til sjálvt høvuðstiltakið – innsiglingina – tí so var vandi fyri, at onkur annar bátur lá á teirra plássi, tá teir løgdu at landi aftur.

Hetta var ikki serliga nøktandi, hvørki fyri fyrireikarar ella bátaeigarar. Tí byrjaðu teir í 2006 við at leggja bátabrúgvar út, og sum teir hava fingið til vega frá alistøðum kring landið.

Eftir stóru undirtøkuna í fjør, hava teir nú av álvara gjørt seg út, og hava útvegað sær ikki færri enn 85 metrar av atløgusíðu aftrat, eins og møguleikarnir at fáa streym og vatn úr landi eru batnaðir almikið.

Fyri at betra um tænastuna uppaftur meiri, er nú møguleiki hjá bátaeigarum at bíleggja sær eitt fast pláss fyri eitt ávíst gjald.

– Líkt er til, at hetta hevur verið eitt sera hent tiltak, tí øll plássini á teirra nýggju brúnni eru longu bíløgd, sigur Rógvi Nielsen.

*snorri@sosialurin.fo*

**Í dag eru øll hesi bátaplássini umbiðin.**

## Skrá fyri Bátastevnuna í Vestmanna 2010

**www.vif.fo**

**Frá mikudegnum 12. mai er høvið at koma við bátum og húsvognum**

**Fríggjadagin 14. mai:**

| | |
|---|---|
| Kl. 19.00 | Trøllafamiljan við Trølla Ommuni á odda kemur til Vestmanna í báti. |
| Kl. 19.30 | Barnakonsert í ítróttarhøllini við Kularótum & Trølla Pætur við allari familjuni. |
| Kl. 23.00 – 04.00 | Dansur á Bryggjuni við Jens Marna & Co. |

**Leygardagin 15. mai:**

| | |
|---|---|
| | Ziska og Lív fylgja við bátunum frá Glyvursnesi. |
| Kl. 14.00 | Café Bryggjan letur upp á keiøkinum. |
| Kl. 14.30 | Allir bátarnir savnast við Fútaklett. Gamli postbáturin "Ólavur" tekur ímóti og skipar innsiglingina til Vestmanna. |
| Kl. 15.30 | Bátarnir koma inn móti keiini, og manningarnar fáa vegleiðing um, hvussu bátarnir skulu liggja. Trygdarnet at spenna millum bátarnar fáast til keyps. Gestirnir fáa heita suppu við onkrum góðum afturvið í teltinum. Søla av bátastevnublusum og krússum. |
| Kl. 16.00 – 19.00 | Mini-tivoli í ítróttarhøllini við fiskibrunni, bóltkasti við ferðmátara, hoppiborg, kaffisølu, tombola og lutaseðlum o.a. |
| Kl. 17.00 | Grilling á keiøkinum. Søla av teimum vælumtóktu Bátastevnubúffunum. |
| Kl. 18.00 | Konsert við Kaj Klein og Henrik Jespersen verður í Vestmanna Kirkju. |
| Kl. 19.00 – 19.20 | Henning Bøgesvang, prestur, heldur talu á kei-økinum. Sangur og harmonikutónleikur. |
| Kl. 19.30 – 21.30 | Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen syngja og spæla. |
| Kl. 21.00 – 04.00 | Smyrjibreyð fæst til keyps í tjaldinum. |
| Kl. 22.00 – 04.00 | DJ show í Dansistovuni fyri ung undir 18 ár. Mark & James skipa fyri. |
| Kl. 23.00 – 04.00 | Dansur í ítróttarhøllini við Thunderbirds og Vestmonnum. 18 ára aldursmark. |





**Náttarbussurin koyrir soleiðis á Bátastevnuni:**

Úr Vestmanna: 21.30 23.30
*Og eftir dansin (Fráferð niðanfyri ítóttarhøllina)*

Úr Havn: 22.30 00.30
*(Fráferð frá City Burger)*

**Skivan** *hevur opið allar dagar kl. 7.00 – 23.00. Morgunbreyð fæst. Fríggjakvøldið og leygarkvøldið verða pylsur o.a. til keyps niðriundir í Skivuni.*

**Klædnahandilin Freya** *hevur opið fríggjadagin kl. 13.00 – 20.00 og leygardagin kl. 10.00 – 20.00.*

**Gávuhandilin Romantique** *hevur opið fríggjadagin kl. 13.00 – 20.00 og leygardagin kl. 10.00 – 14.00.*

**Fjørukrógvin** *og* **Søgusavnið** *hava opið allar dagarnar kl. 9.00 – 17.00.*